# Hómar loysn á læknatroti

Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík, vónar, at nýggja Læknamiðstøðin í býnum kann gera enda á læknatrotinum í Norðoyggjum.

Fríggjadagin varð nýggja Læknamiðstøðin í Klaksvík handað læknunum, og tað var Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri, sum læt læknunum lyklarnar til nýggja húsið á Sandinum.

– Hetta er ein søguligur dagur, tí fyri fyrstu ferð í Norðoyggjum verða umstøður til fýra kommunulæknar í fýra viðtaluhølum. Tí kunnu vit siga, at bólturin at útvega fýra kommunulæknar til Norðoyggjar nú av álvara er spældur til landsstýrið. Eg vóni, at landsstýrismaðurin í Almanna- og Heilsumálum og starvsfólk hansara fara at gera teirra ítarsta til at fáa hesi viðurskifti í rættlag, segði Steinbjørn Jacobsen á móttøkuni.

Bara ein lækni er í føstum starvi í Norðoyggjum, og tað er Magnus Magnussen. Skiftandi avloysarar hava seinnu árini starvast sum kommunulæknar í Norðoyggjum.






## Ógvusligt ferðsluóhapp á Sandi

Fríggjadagin hendi eitt ógvusligt ferðsluóhapp heima á Sandi. Óhappið hendi inni í Dali, har ein jeepur kom koyrandi suðureftir. Brádliga stendur ein seyður á vegnum, og tað var hált. Førarin misti tamarhaldið á jeepinum, men fekk tó hildið hann á vegnum einar 100 metrar longur fram. Tá kom ein bilur koyrandi ímóti honum. Jeepurin fór við síðuni inn í gronina á persónbilinum og síðani niðan av vegnum. Hin bilurin varð standandi á vegnum.

Førarin á jeepinum, og tey trý, sum sótu í persónbilinum vórðu øll innløgd á Landssjúkrahúsið, meðan tann, ið sat við síðuna av í jeepinum, ongan skaða fekk.

Bilførarin á persónbilinum fekk skaða í bróstkassan og grov sár í beininí. Hann mátti skerast út bilinum. Ferðafólkið, sum sat á baksetrinum reyk fram í forrútin. Ferðafólkið, sum sat framman, sat eisini rættiliga fast, men tað slapst tó undan at skera. Bilførarin á jeepinum fekk ilt í ryggin. Hann slapp tó skjótt út aftur av sjúkrahúsinum.

Kanningar verða gjørdar av óhappinum. Sýslumaðurin á Sandi sigur, at hesar ikki eru lidnar enn.

– Vit tóku neyðugu royndirnar beinanvegin fyri at útiloka, at bilførararnir vóru ov jólaligir, men tær royndirnar hava vit ikki fingið svar uppá enn, sigur sýslumaðurin á Sandi.

**- sae –**

## Sami biltjóvur

Leygarmorgunin fekk løgreglan í høvuðsstaðnum eina fráboðan um eitt innbrot á eitt verkstað. Ein bilur varð stolin. Hesin var seinni funnin aftur uppi við SMS, og løgreglan fann tjóvin eisini. Tá vísti tað seg, at tað var tann sami tjóvurin, sum stjól ein bil í Norðragøtu herfyri, og sum varð funnin aftur á Skálatrøð í Havn.

**- sae –**

## Fleiri ferðsluóhapp

Sera hált var um vikuskiftið og av tí sama vóru fleiri smærri ferðsluóhapp. Í Klaksvík fekk løgreglan fráboðan um trý ferðsluóhapp orsakað av hálku. Í tveimum førum var talan um smærri skaðar á bilarnar.

Tað triðja óhappið hendi á Leitinum á veg til Viðareiðis heilt tíðliga sunnumorgun. Bilurin var á veg til Viðareiðis. Tá hann kom niðan á Leiti kom hann í krapa, misti tamarhaldið á bilinum, sum endaði í veitini við síðuna av vegnum. Bilurin fekk nakað av skaða, men ongin fólkaskaði var.

– Talan var heldur ikki um rúsdrekka, sigur vakthavandi á løgreglustøðini í Klaksvík.

Í Havn hendi eitt ferðsluóhapp fríggjadagin, har ein bilur koyrdi fram við treytaleysari víkiskyldu og rendi á ein annan. Har var bert talan um skrokkskaða. Óhappið hendi í Vesturbýnum.

**- sae –**

## Rendu á parkerað akfør

Løgreglan í Eysturoynni tók sær av fýra ferðsluóhappum um vikuskiftið. Í trimum av førunum var talan um bilar, sum rendu á onnur parkerað akfør.

Fríggjamorgunin hendi tað fyrsta, fríggjadagin seinnapartin rennur ein bilur í bakendan á einum øðrum, sum bremsaði brádliga í hálkuni og seinni aftur hevði ein annar bilur bakkað á eina gravkúgv, sum stóð parkerað.

Sunnumorgunin um hálvgum átta tíðina fór ein bilur út av vegnum millum Fjara. Bilførarin var ávirkaður av rúsdrekka. Hann varð handtikin, blóðroynd varð tikin av honum, og hann verður nú skuldsettur fyri at hava koyrt ávirkaður av rúsdrekka.

– Burtursæð frá smærri ferðsluóhappum, hevur vikuskiftið verið stak friðarligt í Eysturoynni, sigur vakthavandi á løgreglustøðini í Runavík.

**- sae -**

## Følsk fráboðan

Herfyri fekk løgreglan í Klaksvík eina fráboðan um ein stolnan bil, sum varð funnin aftur seinni við skaða.

Hetta málið hevur løgreglan nú kannað. Hon er komin eftir, at tilburðurin ikki er farin júst soleiðis fram, sum fráboðanin segði, og úrslitið av hesum er, at tann, ið boðaði frá stuldrinum, nú er skuldsettur fyri falska fráboðan, verður sagt av løgreglustøðini í Klaksvík.

**- sae -**

# Jólaskipið á Klaksvík

14. árið á rað kemur Jólaskipið á Klaksvíkina. Um veður og vindur lova tí, so verður skipið á Klaksvík mikukvøldið kl. 18.00.

Á veg til Klaksvíkar leggur skipið at í Leirvík, og verður tað kl. 16.00. Sum vanligt er, verður nógv gjørt burtur úr jólaskipinum í Klaksvík, og í ár er einki undantak. Skipið leggur at undir Kryvjuvirkinum á vestari síðu, og fer skrúðgonga við jólamonnum, hornorkestri, skótum og nissum á hestbaki heim gjøgnum býin og niðan á vøllin. Har bjóðar borgarstjórin jólamonnunum vælkomnum til Klaksvíkar. Umframt undirhald, kórsang, fýrverkarí og annað, verður eisini felagssangur og Nósi kemur á vitjan.



Tiltakið endar við, at øll børnini fáa pakka frá jólamonnunum.

Sum nakað nýtt, handar borgarstjórin Steinbjørn O. Jacobsen einum klaksvíksborgara "Ársins Rósu". Hetta er ein heiður og eitt herðaklapp fyri at hava gjørt eitt gott arbeiði fyri býin og borgararnar í Klaksvík. Stuðlað jólaskipinum hava Føroya Banki og Klaksvíkar Kommuna.